Starvsnevndin má fáa størri vald

FSF formaðurin heldur, at økta virksemið hjá FSF má bera broytingar í bygnaðinum í sær.

FSF toppurin eigur at fáa meira at siga. Tað er av stórum týdningi, fyrst og fremst fyri innanlands virksemi, men eisini í sambandi við økta altjóða virksemið hjá FSF.

Tað er Torleif Sigurdsson, FSF formaður, ið hevur hesa áskoðan. Og hann skuldi vita, hvat hann tosar um, tí í 10 ár hevur hann verið við í fremstu rød. Hann er tann virkandi fótbóltsformaðurin í Norðurlondum, ið hevur sitið longst við endan.

Vit spyrja, um hann ikki er bangin fyri at verða skírdur fyri at vera ein ráðaríkur fýrur átókt tí, sum donsk fótbóltsfeløg og pressan hava skírt Hans Bjerg Petersen, formann í danska divisiónsfelagsskapinum:

— Einki er at ivast í tí.

FSF formaðurin vil hava størri heimildir til starvsnevndina.

Men málið hjá mær er at fáa betri arbeiðsumstøður og greiðari viðurskifti hjá teimum, ið koma aftaná mær og teimum, ið eg samstarvist við.

Lítlar heimildir

Hví er so neyðugt at broyta, riggar alt ikki sum tað skal? — Í dag er tað soleiðis, at vit hava eina á aðalfundinum valda starvsstjórn og kappingarnevnd. Henda seinna tekur sær av kappingini, og so hava vit eina vælvirkandi útbúgvingardeild, men alt annað tekur starvsnevndin sær av.

Men alikavæl eru lógirnar soleiðis, at starvsnevndin í flestu førum hevur lítlar heimildir. Tak t.d. spurningin um MB—GÍ dystin. Vit kunnu einki gera. T.d. í Danmark enda ivaspurningar á borðinum hjá starvsnevndini. At tær sjáldan gera tað er ein onnur søga. Tað kemst av, at teir hava ógvuliga royndir kreftir í øllum liðum innan skipanina.

Politiskt og administrativt uppbýti

Hvussu vilt tú broyta? — Mín hugsan er, at starvsnevndin verður vald á aðalfundinum. Í henni skulu vera formaður og tveir limir afturat. Allar aðrar nevndir og uppgávur skulu annars verða settar og útinntar eftir samskiping frá starvsnevndini.

Við øðrum orðum kunnu vit siga, at feløgini fótbóltspolitiskt velja starvsnevndina, sum átekur sær at skipa fyri tí administrativa. T.d. hevði verið fint, um vit kundu sett ein aðalskrivara at leiða skrivstovuna, men nær hetta kann gerast veruleiki, veit eg ikki, tí tað er ein peningaligur spurningur. Vit hava sett okkum fyri einki at fara undir, fyrrenn peningaligt grundarlag er fyri tí, og tí kann roknast við, at tað í ávisa tíð afturat verða ólønt fólk, ið mynda sambandið.

Men hvat verður nátt við at geva starvsnevndini heimild at seta øll størv, í staðin fyri at lata feløgini gera tað? — Fyrst og fremst ein størri samanhangur í fótbóltslívinum, sum skuldi verðið øllum at gagni.

Vit sleppa ikki uttanum, at tað er rættuliga tilvildarligt, hvør verður valdur í nevndir, og tað gongur rúm tíð at seta seg inn í uppgávurnar, og summi koma ongantíð inn í arbeiðið, áðrenn onnur koma fram at.

Mítt hugskot gevur møguleikar fyri størri fleksibiliteti, og eingin er í iva um, at tað er starvsnevndin, sum í øllum førum stendur við ábyrgdini. Sjálvandi er henda ábyrgd í síðsta enda yvirfyri aðalfundinum.

Og so skoytir FSF formaðurin uppí, at í einum føri er tað ábyrgdin hjá starvsnevndini at seta nevnd. Og tað er dómsnevndin. Tær avgerðir henda hevur tikið skuldu verið ábending um, at illa ber til at seta fólk, ið bert gera tað, tú sjálvur ynskir. Men í hesum førinum er talan um ein undarligan form fyri demokrati: Vit seta eina nevnd til at taka sær av kærum um avgerðir, vit hava tikið!

-nn-

Bókhaldari

Til apoteksverkið verður søkt eftir bókhaldara at taka við starvi í seinasta lagi 1. oktober 1990.

Skrivstovuhaldið er á Tjaldurs Apotekinum í Tórshavn.

Bókhaldarin hevur høvuðsábyrgd av bók- og roknskaparhaldi apotekverksins herundir ársfjórðingroknskapum, eftirlit við fíggjarætlanum, debitor- og kreditorstýring o.a.m.

Góður kunnleiki til EDV bókhald krevst.

Hollur teoretiskur kunnleiki og praktiskar royndir í bókhaldi og roknskapi annars eru neyðugar.

Løn eftir sáttmála við Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri í 26. lfl.

Skrivlig umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum frá øðrum størvum skulu vera **Landsapotekaranum** í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. august 1990 kl. 9.

Landsapotekarin
Postboks 187, Bryggjubakki 4,
110 Tórshavn

sosialurin

POP TOP

— stuðlar ítróttinum við 10 oyrum av hvørjum pakka

Arnbjørn Sivertsen

Bridge

Viðhvørt er tað betri at spæla við 4-3 býti í trumfi enn í sans. Her er eitt spæl frá tí fyrra dystinum hjá føroyingum móti Danmark. Bæði liðini hjá okkum taptu sín dyst dyggiliga, men høvdu kortini fleiri góð spøl at vísa fram. Her skulu vit siggja Per Kallsberg og Niels Nielsen royna seg.

E/NS

♠ A-J-10-3
♡ K-2
◇ J-7
♣ K-5-4-3-2

♠ 9-7-6-5
♡ Q-8-5-4
◇ 9-6
♣ Q-8-7

N / V E / S

♠ Q-2
♡ J-9-7
◇ K-Q-4
♣ A-J-10-9-6

♠
♡ K-8-4
◇ A-10-6-3
♣ A-10-8-5-3-2

V	N	E	S
A. Mohr	Per	V. Dam	Niels
-	-	1 ut	2 kl 1)
pass	2 ut 2)	pass	3 rú
pass	4 sp	pass	pass
D	pass	pass	pass

1) Exclusion — antin góðan kleyvaralit ella hinar litirnar.
2) Natúrligt yvirfyri natúrligum innmeldi.

Útspæl: sp Q

Villy Dam legði fyri við sp Q, sum Per tók á hondini við essinum. Spældi síðani rú J, Dam legði frúnna, og Per tók við essinum. Hann spældi seg inn á hondina við hj K og síðan rú 7 - eini skjót rú 4 frá Dam og eini líka so skjót rú 10 frá borðinum!!

Rútari aftur fór runt til Eystan, sum skifti til hjartara. Per fór upp á essið og tók sínar stingir við krosstrumfing. 10 stingir og 790 í kassan.

Við hitt borðið spældi Eystur (Jóannes Mouritsen) 3 kl D og fór tríggjar niður, sum kostaðu 500, og føroyingar fingu 7 imp fyri spælið.

Kvinnurnar spældu tey somu kortini sum menninir. Í lokaða rúminum meldaðu Marjun Restorff og Randi Jacobsen eisini 4 sp +4 hetta spælið:

V	N	E	S
B. Christens.	Marjun	L. Skaanning	Randi
-	-	1 ut	pass
pass	2 kl 1)	pass	2 rú
pass	2 sp	pass	3 hj
pass	3 ut	pass	4 sp
pass	pass	pass	

1) Upplýsingardupling, 12-14 HP

Í tí opna rúminum meldaðu donsku kvinnurnar 3 ut og máttu ein niður eftir útspæl av kl Q frá Marionnu Eystberg. Spælið gav sostatt teimum føroysku kvinnunum ikki minni enn 12 imp!

Tilsamans 12 borð spældu spældu spælið. Trý spældu 4 sp. Seks spældu 3 ut, ein fekk +6 (!), ein +5 og ein +3. Tveir fóru ein niður, og ein fór tveir niður. Hini meldini vóru E: 3kl D -3, E: 1 NT -2 og S: 2rú +4. Stór ósemja um, hvussu kontraktin skuldi eita.